# Avgerð 1/2007 frá Yvirkærunevndini
# hjá
# Fótbóltssambandi Føroya

## Viðvíkjandi kæru frá Skála Ítróttarfelag um úrskurð hjá Aganevndini, dagfest hin 2. juli 2007

Yvirkærunevndin hjá Fótbóltssambandi Føroya hevur fingið eitt mál til avgerðar, sum hevur at gera við dómaraseðilin til dyst í Formuladeildini millum B36 og Skála. Dysturin var leiktur tann 13. mai 2007 og B36 hevði heimadyst.

Í úrskurði, dagfestum 2. juli 2007, hevur Aganevndin hjá Fótbóltssambandi Føroya tikið avgerð um, at Skála Ítróttarfelag verður dømt at tapa dystin móti B36 av tí, at Skála brúkti ein leikara í dystinum, sum ikki stóð skrivaður á dómaraseðilinum.

## Formellar reglur

Yvirkærunevndin hevur viðgjørt kæruna frá Skála Ítróttarfelag við heimild í § 11, stk. 4 í agareglugerðini, har tað framgongur, at Yvirkærunevndin tekur avgerðir í kærumálum viðvíkjandi avgerðum hjá Aganevndini, ið ikki eru endaligar.

Sambært § 12, litra f) í agareglugerðini kann ein avgerð frá Aganevndini um, at eitt felag verður dømt til at tapa ein dyst, kærast til Yvirkærunevndina og skal hetta sambært § 12 verða gjørt innan 5 dagar aftaná at kærarin hevur móttikið úrskurðin.

Skála Ítróttarfelag hevur móttikið úrskurðin frá Aganevndini tann 3. juli 2007. Kæran frá Skála Ítróttarfelag til Yvirkærunevndina er dagfest 6. juli 2007 og latin inn við telduposti tann 7. juli 2007 og kæran er tí latin inn rættstundis.

## Gongdin í málinum

Yvirkærunevndin hevur í sambandi við støðutakanina til kæruna frá Skála Ítróttarfelag lagt til grund, at gongdin í málinum hevur verið henda:

Tann 13. mai 2007 varð dystur leiktur í Formuladeildini millum B36 og Skála, á heimavølli hjá B36. Í 81. minutti av dystinum varð ein leikari hjá Skála skiftur út. Tann leikarin, ið kom inn á vøllin fyri útskifta leikaran, var leikari nr. 15, Slavisa Kaplanovic.

Eftir dystin varð dómarin varðugur við, at leikari nr. 15 hjá Skála ikki var skrivaður á dómaraseðilin, ið var innlatin fyri byrjan av dystinum. Dómarin setti seg beinanvegin í samband við Skála og segði teimum frá støðuni, um tann manglandi leikaran á dómaraseðilinum.

Tann 14. mai 2007 kærdi B36 Skála til Aganevndina við kravi um, at Skála varð dømt til at tapa dystin fyri brot á § 27 í kappingarreglunum hjá FSF.

Við úrskurði, dagfestum tann 2. juli 2007 frá Aganevndini, fekk B36 viðhald í sínum pástandi og Skála varð dømt til at tapa dystin við málmuninum 0-0.

## Kæran til Yvirkærunevndina og grundgevingar frá Skála fyri at broyta avgerðina hjá Aganevndini

Skála Ítróttarfelag sigur í kæru síni til Yvirkærunevndina millum annað, at felagið viðurkennur, at Slavisa Kaplanovic, sum varð skiftur inn í 81. minutti fyri Obele O. Okeke, ikki var skrivaður á dómaraseðilin. Skála Ítróttarfelag kann tó ikki taka undir við, at felagið verður dømt at tapa dystin.

Felagið heldur tað ikki vera samanhang millum støddina av mistakinum og ta revsing, sum Aganevndin hevur tikið.

Skála vísir eisini á, at felagið hevði bara 15 leikarar á dómaraseðlinum, tí at Slavisa Kaplanovic av misgávum ikki varð komin við á seðilin.

Felagið vísir á, at talan í hesum førum er um eitt mistak. Felagið vísir eisini á, at tað ikki ber til at siga, at hetta mistakið var framt fyri at fjala nakað, ella fyri at felagið skuldi fáa nakrar serligar fyrimunir.

Felagið vísir eisini í kæru síni á, at tað finnast fordømi um mál av hesum slagi í Føroyum, og felagið metir ikki, at kærunevndir eiga at síggja burtur frá fordømum, tá ið líknandi avgerðir skulu takast nú.

Felagið vísir til avgerð, tikin av Kappingarnevndini tann 13. apríl 2005. Í hesum málið hevði B71 gjørt sama mistak sum Skála í einum dysti móti Royn tann 28. mars 2005. Kappingarnevndin tók tá ta avgerð, at brot varð framt á reglurnar, men at talan var um eitt mistak, sum ikki var framt fyri at vinna sær nakran fyrimun. B71 fekk eina bót á 1.000,00 kr. fyri ikki at hava umsitingarligu viðurskiftini í lagi.

Henda avgerð var seinni staðfest av dómsnevndini hjá FSF.

Felagið vísir eisini á, at tað er ein slíkur munur á føroyskum og altjóða mannagongdum - hvat viðvíkur dómaraseðli – at tað á ongan hátt ber til at bera hesi viðurskifti saman.

Eftir føroyskum mannagongdum skal dómarin hava dómaraseðilin í seinasta lagi 45 minuttir áðrenn ein dystur byrjar. Heimaliðið er tað fyrra til at útfylla seðilin, síðani fær útiliðið hann. Hetta hendi altíð seint og tí skal útiliðið ofta gera ógviliga skjótt av, fyri at halda tíðina.

Skála vísir í kæruni á, at felagið loyvir sær at seta spurnartekin við gegnið hjá Kjartani Mohr, nevndarlimi í Aganevndini.

Skála hevur skilt, at Kjartan Mohr hevur verið við í viðgerðini av málinum, og tað mótmælir felagið upp á tað harðasta, tí hann eftir teirra tykki er ógegnigur í hesum máli.

Felagið vísir á, at Kjartan Mohr hevur verið nevndarlimur og formaður í B36 í nógv harrans ár, men fór úr nevndini fyri einum ella tveimum árum síðani. Felagið heldur, at tað er ógvuliga løgið, at hann sær seg føran fyri objektivt at viðgera hetta mál, sum hansara gamla felag er partur av.

Við hesum vil felagið ikki siga, at tað hevur ávirka hansara avgerð, men grundarlag er fyri iva, og tí átti Kjartan Mohr ikki at verið við í viðgerðini. Felagið heldur, at í hansara stað átti ein av eykalimunum at traðka til.

## Hoyring

Í sambandi við málsviðgerðina av kæruni hevur Yvirkærunevndin tann 20. juli 2007, jvb. § 13 í Agareglugerðini, sent kæruna til hoyringar hjá Skála og B36.

Eisini hevur Yvirkærinevndin spurgt Aganevndina hvørjir limir í nevndini vóru á fundi um málið og hvørjir limir hava tikið avgerðina frá 2. juni 2007.

## Hoyringarskriv frá B36

Í hoyringarskrivinum sigur B36, at felagið er fullkomuliga samt í úrskurðinum hjá Aganevndini og mælir Yvirkærunevndini til at staðfesta hann.

Felagið vísir á, at tað sjálvsagt ikki kann síggjast burtur frá fordømum í føroyskum kappingum, men onnur fordømi enn tað, sum Skála nevnir í kæruni, eru eisini. B36 vísir til avgerð, sum varð tikin av kappingarnevndini, har nýtsla av ólógligum spælara – og ein spælari er ólógligur, um hann antin ikki hevur spæliloyvi, ikki stendur á dómaraseðlinum ella hevur leikbann – hevði somu fylgjur, sum avgerðin hjá Aganevndini fastsetur, t.d. tá B36 í 2005 varð dømt at tapa steypadyst móti Skála, tí spæliloyvi hjá einum B36-leikara ikki var í lagi.

Henda dystin vann B36 annars á vøllinum, men kappingarnevndin dømdi B36 at tapa og Skála helt fram í steypakappingini sum vinnari. Avgerðin hjá kappingarnevndini varð staðfest av dómsnevndini.

Eisini vísir B36 á, at kæruinstansirnir mugu nú hyggja meiri eftir, hvussu líknandi mál eru handfarin í øðrum londum og í altjóða kappingum. Í hesum sambandi nevnur B36, at felagið hevur fingið upplýst frá íslendskum heimildarmanni, at Leiftur av Ólavsfirði kom í meinlíka støðu í einum UEFA-dysti, og varð dømt at tapa dystin við málúrtøkuni 3-0.

B36 er av tí fatan, at eingin ivi er um, at munur er á, hvussu ein dystur í Formula deildini og ein UEFA dystur verða avgreiddir. Hetta frítekur kortini ikki nøkrum frá at uppfylla tær treytir, sum settar eru í lógum og stevnum, sum galdandi eru fyri fótbóltin í Føroyum.

Føroyar hava fingið limaskap í UEFA og FIFA og skulu tí skipa síni viðurskifti samsvarandi boðum frá hesum felagsskapum.

B36 vísir á, at spæliloyvið og dómaraseðilin eru mest týðandi skjølini í spælinum. Um slakað verður við krøvunum til hesi skjøl, fær hetta ikki bert avleiðingar fyri, hvussu feløgini taka álvaran í fótbóltsspælinum, men trúðvirðið í altjóða høpi stendur uppá spæl.

## Upplýsingar frá øðrum Norðanlondum

Yvirkærunevndin hevur spurt íslendska fótbóltssambandið um málið viðvikjandi Leiftur, sum B36 vísir til í skrivi til Yvirkærunevndina.

Yvirkærunevndin hevur fingið upplýst, at Leiftur hevði 18 leikarar, ið er mest loyvda leikaratalið, skrivaðar á dómaraseðilin. Felagið brúkti síðani ein spælara afturat, t.e. spælara nr. 19. Yvirkærunevndin metur ikki, at málið við Leiftur kann samanberast við hetta mál. Yvirkærunevndin hevur tí ikki lagt dent á Leiftur málið.

Yvirkærunevndin hevur eisini spurgt fótbóltssambondini í Norðalondum um hvørja siðvenju tey hava, tá ið støða skal takast til sektir í málum, har brotið er líkt tí, sum Skála hevur gjørt – har dómaraseðilin ikki var rætt útfyltur.

Fótbóltssambondini í Íslandi, Danmark, Finlandi og Svørríki hava upplýst, at tey í einum líknandi føri høvdu givið felagnum, sum hevði framt brotið, eina bót heldur enn at døma viðkomandi felag at tapa dystin.

## Spurningur um gegni

Skála hevur sum omanfyri nevnt í kæru síni víst á, at felagið metir Kjartan Mohr, lim í aganevndini, at hava verið ógegnigan í sambandi við viðgerðina av málinum í aganevndini.

Tað eru ikki ásettar reglur um gegni í agareglugerðini. Í § 3 í agareglugerðini er tó ásett, at í tann mun reglugerðin onga áseting hevur, er tann til ein hvørja tíð galdandi agareglugerð fyri fótbólt hjá FIFA galdandi.

Í § 94, stk. 1 í FIFA Disciplinary Code er ásett, at limir í aganevndum undir FIFA ikki eiga at luttaka á fundum viðvíkjandi málum, har tað eru verulig ("serious") orsøk til at ivast í gegni teirra. Í § 94, stk. 2, litra b er ásett, at reglan í stk. 1 millum annað er galdandi, tá ein limur hevur samband við ein part í málinum ("is associated with any of the parties").

Við maili frá 23. juli 2007 hevur Forkvinnan í Aganevndini Anni á Hædd upplýst, at Aganevndin var fullmannað undir viðgerðini av málinum. Ingunn Eiriksdóttir, Kjartan Mohr og Anni á Hædd luttóku í viðgerðini.

Eisini upplýsir forkvinnan, at Kjartan Mohr gjørdi vart við, at spurningur kundi verið settur viðvíkjandi hansara gegnið orsakað av hansara fortíð í B36. Gegnisspurningurin var viðgjørdur í Aganevndini, og nevndin metti ikki, at fyrrverandi tilknýtið hjá Kjartan Mohr til B36 hevði við sær, at hann varð ógegniður í Aganevndarviðgerðini av málinum, har B36 er partur.

Yvirkærunevndin hevur undir viðgerðini spurt Kjartan Mohr um hansara tilknýtið til felagið B36. Hann hevur upplýst, at hann í gott 18 ár var nevndarlimur í B36, sum kassameistari meginpartin av tíðini, og í umleið 1 ár sum formaður í felaginum. Hann upplýsir, at hann hevur trekt seg burtur úr øllum felagsarbeiði, men hann hevur hjálpt felaginum at selt lýsingar.

Yvirkærunevndin hevur eisini undir viðgerðini av málinum spurt B36 hvat fyri tilknýtið Kjartan Mohr hevur til felagið, herundir formelt og/ella reelt. Felagið hevur til henda spurning svara, at Kjartan Mohr er limur í B36, men hevur seinasta 1½ árið ella so ongan leiklut havt í leiðslu ella nevndum hjá B36.

Felagið upplýsir, at Kjartan Mohr hevur hjálpt B36 at selja lýsingar til leikskránna, og tey bæði bløðini Jóla- og Ólavsøkutíðindi. Tað er blivið upplýst, at hetta arbeiðið er upp á free-lance basis, og at Kjartan Mohr er ikki limur í nakrari fastari nevnd hjá B36.

Yvirkærunevndin metir, at Kjartan Mohr sum limur í B36 ikki átti at havt luttikið í viðgerðini av málinum í aganevndini. Í staðin átti varðalimurin hjá Kjartani Mohr at havt tikið sætið í nevndini.

Tað kann eisini viðmerkjast, at aganevndin sambært § 49, stk 2, 2. pkt. í lóg fyri Fótbóltssamband Føroya kann taka avgerð, tá í minsta lagi tveir limir eru til staðar. Tí kundi aganevndin eisini havt tikið avgerð, um Kjartan Mohr ikki luttók í viðgerðini.

Yvirkærunevndin grundar sína avgerð á, at Kjartan Mohr sum limur í B36 má metast at hava samband við B36. Somuleiðis er upplýst, at Kjartan Mohr framvegis arbeiðir fyri B36 við ítøkiligum uppgávum og eisini hetta má metast at vera eitt tilknýti til B36, sum kann vera egnað at sáða iva um gegni hansara.

Yvirkærunevndin metir hinvegin ikki, at tað, at Kjartan Mohr áður hevur verið nevndarlimur og eisini formaður í B36 í sær sjálvum ger, at hann er ógegnigur at taka avgerð í fyriliggjandi málinum.

Yvirkærunevndarin metir tó, at nevndarlimir í slíkum málum av álvara eiga at umhugsa at siga seg frá í sambandi við málsviðgerðina, ikki minst tá tað er møguligt at innkalla varalim, eins og Aganevndin kundi havt tikið avgerð við teimum báðum eftirverandi nevndarlimunum.

Tó at Yvirkærunevndin metir, at Kjartan Mohr ikki átti at luttikið í viðgerðini av málinum, skal Yvirkærunevndin viðmerkja, at Kjartan Mohr sjálvur gjørdi vart við, at spurningur kundi setast við hansara gegni.

Eisini eigur dentur at verða lagdur á, at tað ikki eru upplýsingar í málinum, sum benda á, at ósaklig fyrilit hava verið tikin í sambandi við avgerðina hjá Aganevndini.

## Hoyringarfundur

Tann 1. august 2007 var hoyringsfundur í Yvirkærunevndini. Á hesum fundi vóru – umframt limirnir í Yvirkærunevndini - tvey umboð fyri ávíkavist Skála Ítróttarfelag og B36.

Á fundinum fingu partarnir møguleika fyri at føra fram sjónarmið afturat teimum, sum partarnir høvdu viðmerkt skrivliga í sambandi við kæruna.

## Avgerð hjá Yvirkærunevndini

Yvirkærunevndin staðfestir eins og Aganevndin, at brot er framt á § 27 í kappingarreglunum, við tað at Skála ikki hevði hevði skrivað leikara nr. 15 Slavisa Kaplanovic á dómaraseðilin. Hetta hevur Skála eisini viðurkent.

Spurningurin er hereftir, hvør sektin skal verða fyri brotið.

Sambært § 8 í agareglugerðini ber til at geva felagi fylgjandi sektir:

a) átalu
b) ávarðing
c) bót
d) døma felag at missa heimavøll
e) seta bann fyri at flyta leikarar
f) áseta dyst/ir at skula leikast uttan áskoðarar
g) áseta dyst/ir at leikast á uttanveltaðum vølli
h) døma felag at tapa dyst
i) frátaka ella tilluta stig og mál
j) frátaka felag heiðursmerki
k) strika meistaraheiti
l) døma lið at flyta í lægri deild
m) koyra felag úr kapping

Yvirkærunevndin er av tí fatan, at tá avgerð skal takast um, hvør fylgjan av einum broti av hesum slagi skal vera, skal millum annað metast um hvussu álvarsligt brotið er.

Í hesum sambandi eigur at verða mett um, hvørt brotið kann metast at vera framt við tí fyri eyga at fáa ein ítøkiligan fyrimun burturúr. Tað eigur eisini at verða hugt at, um spælarin, sum talan er um, annars hevur loyvið at spæla við viðkomandi felagi.

Tá revsingin skal ásetast má eisini havast í huga, hvussu álvarsligt brotið er í mun til onnur brot, sum eru komin fyri ella sum kunnu hugsast at koma fyri frameftir.

Sambært vanligum løgfrøðiligum grundreglum um proportionalitet er eisini týdningarmikið, at sektin samsvarar brotinum.

Yvirkærunevndin er av tí metan, at hóast dómaraseðilin er eitt týdningarmikið skjalprógv, tá ræður um fyrisitingina av fótbóltskappingum, bæði í Formuladeildini og í øðrum deildum, eigur at verða havt í huga, at í hesum ítøkiliga førið er talan um ein leikara, sum hevði spæliloyvi at leika fyri Skála. Spælarin, sum talan er um, hevur tí loyvi at taka lut í kappingini.

Í málinum er einki, sum bendir á, at talan er um annað enn eitt hendiligt mistak og upplýsingar fyriliggja ikki um, at Skála skal hava fingið nakran ella skal hava miðað eftir at fáa ein serligan fyrimun við at fremja brotið.

Hetta eru eftir meting yvirkærunevndarinnar týdningarmikil atlit, tá støða skal takast til, hvørja av teimum sektum, sum eru nevndar í § 8, tikið eigur at verða til í hesum málinum.

Við støði í tí tilfari, sum er komið fram í málinum og við støði í siðvenju á økinum, bæði í Føroyum og í Norðanlondum, metir yvirkærunevndin ikki, at grundarlag er fyri at døma Skála at tapa dystin móti B 36.

Avgerðin hjá aganevndini um at Skála ítróttarfelag verður dømt at tapa dystin móti B 36 í Formuladeildini fyri at hava brúkt ein leikara í dystinum, sum ikki stóð skrivaður á dómaraseðlinum, verður tí sett úr gildi. Úrslitið frá dystinum, sum endaði við javnleiki 1-1, skal tí standa við.

Skála verður dømt at rinda eina bót á kr. 10.000,00.

Tórshavn 3. august 2007

Birta Biskopstø Andrass Arge Jens Erik Magnussen